Hesa yrking skrivaði Finnbogi Ísakson, sáli, tá dótturin, Glæma Finnbogadóttir, andaðist, ikki fýra mánaðar gomul.

Mamman, Ása, hevur sent okkum vøkru og hjartanemandi yrkingina, sum ikki hevur staðið á prenti áður.

Leygardagin 14. oktober eru liðin 20 ár síðani Glæma doyði.



## TIL GLÆMU

* 27. juni ✞ 14. oktober 1986

*Onki longur er tað sama,*
*morgun kvøld er, dagur nátt.*
*Alt er broytt, nú lítil glæma*
*borin er um deyðans gátt.*
*Tí tað ljós, í eystri rann,*
*morgunstund í vestri svann.*
*Eins og norðljós skært tað skygdi,*
*men tó vónarbrýr tað bygdi.*

*Meðan slavnir vindar strúka*
*skýmingsstund um heyg og hól,*
*eygu blíð og holdið mjúka*
*verma meir enn summarsól.*
*Lítið reyðargullið vá*
*mett við barnsins bros og brá.*
*Tá tað hendur legði saman,*
*bjartast skygdi sólarglæman.*

*Missur elvir skjótt til iva,*
*saknur verður ísbrúgv sterk.*
*Men har vatn er, urt kann liva,*
*dropin ger har undurverk;*
*Har, sum sorgarlogin brann,*
*minnið dýra valdið vann.*
*Tá ið stormar sólskin køva,*
*minnisglæma veitir fløva.*

*november 1986*
**Pápi**

Astma & Allergi Felagið:

# Undirhald og heilsa í Miðlon

Leygardagin 14. oktober frá kl. 13-15 skipar Astma Allergi Felagið fyri einum áhugaverdum tiltaki í Miðlon í Havn.

Umframt væl umtóktu undirhaldararnar "Angela og Hannibal" verður luttøka frá ymiskum fólkum í heilsuverkinum, sum t.d. ráðgevar frá astma- og allergibólkinum á Apotekinum og fysioterapeutum í heilsuverkinum. Eisini verða tvær sjúkrasystrar, ein til vaksin og ein til børn.




*"Angela og Hannibal" luttøka í Miðlon*

## Dagurin

**14. oktober. Kalixtus**, deyður umleið ár 222. Trælur, sum gjørdist diakonur hjá pávanum og fekk um hendur at standa fyri jarðarferðum. Summar av katakombunum bera navn hansara. *Veturnætur,* vetrarhálvár byrjar.

**15. oktober. Heiðveig**, deyð ár 1243. Hon var greivadóttir úr Bayern og giftist hertoganum Heinriki I í Slesiu. Bygdi fleiri sjúkarhús og kleystur. Varð skírd halgikvinna í 1267. Heiðveig er føroyska navnið fyri Hedvig.

**16. oktober. Gallus,** deyður ár 640. Írskur munkur, sum læt kleystrið St. Gallen við Bodenvatnið byggja. Doyði 95 ára gamal.

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá systir, abbasystir, svigarinda og fastir okkara

**Jana P. F. Niclassen**
ættað av Velbastað, búsitandi í Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Takk til Kjartan Mørkøre prest fyri góð orð.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Parkinsonfelagið og takk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Lina**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu hjálp og samkenslu, tá kæra kona mín og góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Helga Strømsten**

doyði og varð jarðað.

Takk fyri blómur og kransar og takk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Ein serstøk tøkk til tykkum á sambýlinum Gøtubrá.

*Familjunnar vegna*
**Luddi, Regin, Jóhan, Jákup Sigurd og Eyðfríð**

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Karl Saltá**, Saltnesi, andaðist 11. oktober, 72 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum leygardagin kl. 16. Jarðarferðin verður sunnudagin kl. 14 úr Fríðrikskirkjuni. Tey, ið vilja minnast Hans Karl kunnu lata eina gávu til Fríðrikskirkjuna, konta í peningastovnunum.

**Karolina Petersen**, Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 11. oktober, 82 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 19. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Karolinu, kunnu lata Vistarheimunum í Havn eina gávu, konta í Føroya Sparikassa.

**Gudrun Joensen**, flogterna, Sandavágur, fer til gravar úr heiminum leygardagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Gudrun, kunnu lata eina gávu til synirnar, konta í Føroyabanka.

Kistan við **Jóan Petur Weihe**, Søldarfjørður, fer úr Landssjúkrahúskapellinum í morgin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju leygardagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Jóan Petur, kunnu lata Bønhúsinum í Søldarfirði eina gávu. Konta í peningastovnunum.

**Rói Slættalíð Dam**, lítli sonur Maiken og Anfinn Dam, Norðskála, andaðist týsdagin 10. oktober, 2 ára gamal.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaða

**Gudrun**

andaðist 10. oktobur, 41 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr heiminum leygardagin kl. 14.00.

**Oddmar, Borgar og Eigil**

*Tey ið vilja minnast Gudrun kunna lata eina gávu til synirnar, konta í Føroya Banka.*

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hans Karl Saltá**
Saltnes

andaðist mikudagin 11. oktobur, 72 ára gamal.

Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum leygardagin kl. 16.00.
Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni sunnudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Anna**
**Edna, Hildigunn og Jóan Símun við familjum**

*Tey ið vilja minnast Hans Karl, kunnu lata eina gávu til Fríðrikskirkjuna, konto í peningastovnunum.*